


# Stjórnarskipanin løgd fyri tingið aftur

**POLITIKKUR** Uppskotið, sum fall burtur í seinastu tingsetu, varð lagt fyri tingið aftur í gjár



Eirikur Lindenskov

Tað var Poul Michelsen, formaður í »Grein 25 nevndini«, sum legði uppskotið um Stjórnarskipan Føroya fyri tingið aftur í gjár. Tað merkir, at uppskotið nú aftur kemur til viðgerðar, hóast løgmaður á tíðindafundi í Skagen herfyri boðaði frá, at uppskotið fall burtur á ólavsøku og ikki fór at verða lagt framaftur.

- Eg haldi, at tað er passandi, at danska stjórnin veit, at málið aftur í er tinginum, sigur Poul Michelsen í stuttari viðmerking.

Í skrivi frá nevndini í sambandið við framløguna av málinum 27. februar í ár sigur nevndin, at »endamálið hevur verið at finna breiðar politiskar semjur við støði í tí arbeiði, sum longu er gjørt, og at orða eitt uppskot, sum er á nøktandi løgfrøðiligum støði.

Nevndin hevur gjørt av at nýta stuttar, yvirskipaðar orðingar til tess at tryggja, at skipanin verður liðilig og væl egnað at tillaga seg broyttum umstøðum. Hetta er orsøkin til, at viðmerkingar ikki eru til tær einstøku lógargreinarnar. Nevndin metir, at rúmd eigur at verða givin fyri, at tulkingin av teimum einstøku greinunum kann broytast við tíðini.

Til tess at røkka hesum máli, hevur nevndin lutvíst sjálv arbeitt við uppskotinum, og lutvíst saman við umsitingini í Løgtinginum.

Harumframt hevur nevndin fingið skrivligar frágreiðingar frá serfrøðingum um ymisk viðurskifti, og kallað serfrøðingar inn í nevndina.

Eisini eru ávísir spurningar umrøddir við viðkomandi fólk.

Nevndin metir, at uppskotið nú er egnað at leggja fyri tingið til viðgerðar, og síðani til fólkaatkvøðu.

Tað hevur eydnast at fáa semju í nevndini um so at siga allar greinarnar í lógini.

Hóast nevndin leggur eitt felags uppskot fram, eru nevndarlimir, sum í tingviðgerðini vilja gera vart við serstøðu í ávísum greinum.«

Hóast uppskotið fall burtur, tí tað ikki varð avgreitt í síðstu tingsetu, so fær tingið nú aftur møguleikan at viðgera málið, nú tað er lagt fyri tingið aftur.

eirikur@sosialurin.fo



## Uni Leitisstein Hansen
Tónleikaummælari

***Hvat gert tú beint nú?***
- Eg siti og ummæli nýggju fløguna hjá SIC, Fighters They Bleed. Ein spennandi uppgáva og ein góð fløga.

***Hvat dámdi tær tónleikasummarið í Føroyum?***
- Tað var stórt. Enn einaferð var talan um eitt gott summar í so máta. Ikki minst, tí at Ólavsøkukonsertin gjørdist so góð og kom upp at standa aftur. Serliga við Duné sum høvuðsnavni riggaði væl. G! kom eisini gott burtur úr ódnarveðrinum og eg vóni, at teir herja á aftur næsta ár.

***Er nakað, sum tú gleðir teg til?***
- Eg gleddi meg til Premier League fór at byrja, og tað hendi so um vikuskiftið. Annars gleði eg meg mest til, at tað slítur í aftur her í Danmark og at kjallarin verður turrur aftur.

## Í MORGIN




Lot til andøvsgul av landnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 14 og 17 stig.

## FRÍGGJADAGIN




Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 13 og 16 stig.

## LEYGARDAGIN




Gul til stívt andøvsgul av eystri og landsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av eystri og landnyrðingi og ælingur, men kanska onkur sólglotti. Hitin millum 8 og 12 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 1002 hPa, í útsynning úr Føroyum kemur hendavegin og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum komandi samdøgur.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið við Føroyar fer í landsynning og brúgvalagið við Føroyar stendur mestsum í stað.

## HITALAG




## AVFALL



Miðal: 83 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | 5 | **Tromsø** | 6 | **Moskva** | 16 | **Athen** | 26 |
| **Reykjavík** | 11 | **Bergen** | 12 | **Berlin** | 25 | **Beijing** | 30 |
| **Tórshavn** | 10 | **Oslo** | 22 | **Paris** | 20 | **New Dehli** | 30 |
| **Lerwick** | 9 | **Stokkhólm** | 20 | **Madrid** | 28 | **Bangkok** | 34 |
| **Aberdeen** | 12 | **Keypmannah.** | 19 | **Róm** | 26 | **Sydney** | 14 |
| **London** | 19 | **Helsinki** | 16 | **Malorca** | 26 | **New York** | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

10. august Tendring/mánin næstur jørðini
16. august Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 18. aug. | 02:41 | 15:07 | 01:41 | 14:07 | 01:56 | 14:22 | 04:41 | 17:07 | 05:41 | 18:07 | 00:56 | 13:22 | - | 12:22 | 02:56 | 15:22 | 03:56 | 16:22 | 02:26 | 14:52 | 03:41 | 16:07 |
| 19. aug. | 03:33 | 15:58 | 02:33 | 14:58 | 02:48 | 15:13 | 05:33 | 17:58 | 06:33 | 18:58 | 01:48 | 14:13 | 00:48 | 13:13 | 03:48 | 16:13 | 04:48 | 17:13 | 03:18 | 15:43 | 04:33 | 16:58 |
| 20. aug. | 04:23 | 16:47 | 03:23 | 15:47 | 03:38 | 16:02 | 06:23 | 18:47 | 07:23 | 19:47 | 02:38 | 15:02 | 01:38 | 14:02 | 04:38 | 17:02 | 05:38 | 18:02 | 04:08 | 16:32 | 05:23 | 17:47 |
| 21. aug. | 05:11 | 17:33 | 04:11 | 16:33 | 04:26 | 16:48 | 07:11 | 19:33 | 08:11 | 20:33 | 03:26 | 15:48 | 02:26 | 14:48 | 05:26 | 17:48 | 06:26 | 18:48 | 04:56 | 17:18 | 06:11 | 18:33 |
| 22. aug. | 05:55 | 18:15 | 04:55 | 17:15 | 05:10 | 17:30 | 07:55 | 20:15 | 08:55 | 21:15 | 04:10 | 16:30 | 03:10 | 15:30 | 06:10 | 18:30 | 07:10 | 19:30 | 05:40 | 18:00 | 06:55 | 19:15 |